# nski dreymurin

Jú, tað var demokraturin Harry Truman, sum síðan eisini sendi amerikanskar hermenn inn í Korea (inn í deyðan) til at berja kommunismuna niður. Og tað vóru Kennedy og Johnson, sum vóru við til at økja um hermegina í Vietnam. Og tað var Carter, sum leyp á Nikaragua í 1979. Og tað vóru demokratarnir Wilson, Roosevelt og Clinton, sum hildu seg aftur við at blanda seg í ávikavist, 1.heimsbardaga, 2.heimsbardaga, í Bosnia og í Rwanda, tí at tað ikki var alneyðugt hjá amerikumonnum at blanda seg í blóðbað í øðrum heimspørtum.

Jú, demokratarnir hava so sanniliga havt síni miseydnaðu inntriv og síni vantandi inntriv á tí uttanríkispolitiska økinum millum ár og dag. Demokratarnir trúðu eins og republikanararnir fult og fast uppá, at kommunisman var ein hóttan undir kalda krígnum, demokratarnir atkvøddu eins og republikanararnir fyri krígnum í Irak í 2003, og tað var við demokratunum og Clinton á odda, at USA sum heimsins størsta hernaðarveldi heldur valdi at leggja dent á at tryggja sínar egnu íbúgvar enn at steðga fólkamorðinum í Rwanda. Um vit steðga á við hetta síðsta v.v. fólkamorðum, so sigi eg als ikki, at republikanararnir hava verið nakað frægari enn demokratarnir fyri at steðga fólkamorðum – teir hava heldur verið verri, og demokratarnir við Clinton á odda skulu so eiga tað, at teir fingu steðgað krígnum í Bosnia í 1995.

## USA skal steðga fólkamorðum – eisini í Irak

Men tá fólk altso tosa um, at tey heldur vilja síggja ein demokratiskan forseta í Hvítu Húsunum, tí demokratarnir kríggjast minni enn republikanararnir og taka sær ístaðin meira av teimum amerikonsku íbúgvunum, so er hetta ein ikki heilt røtt hugsan, tí demokratarnir hava millum ár og dag verið minst líka óførir sum reublikanararnir til at fremja óheppin átøk úti í heimi, fyri síðan at lata vera við at fremja átøk, har tey eru neyðug, so sum í Rwanda, Somalia og Bosnia. Og fyri enn einaferð at steðga á við kjakinum, um man skal steðga fólkamorðum, so trúgvi eg uppá, at einhvør amerikanskur forseti skal í størst møguligan mun nýta orku uppá at betra um viðurskiftini hjá amerikonsku borgarunum, men eg meti tað tó vera rætt, at USA sum heimsins størsta hernaðarveldi ger inntriv fyri at steðga fólkamorðum kring knøttin, tó at eg eins og Ron Paul meti, at USA so nógv sum gjørligt skal halda seg á sínum egna heimsparti. Júst her meti eg, at núverandi forsetin (Bush) kundi havt fingið størri rós fyri tað, hann hóast alt hevur framt í m.a. Irak.

Hygg t.d. at Kosovoinntrivinum í 1999 hjá Bill Clinton og NATO ! Her steðgar onkur á og sigur, at tað var eitt væleyndað inntriv, tí Milosevic týndi ein minnilutabólk, og tað var neyðugt at steðga hesi týning. Eg eri samdur við, at tað var neyðugt at steðga týningini av kosovo-albanarunum í Jugoslavia, men um Bill Clinton við altjóða samfelagnum handan seg skal fáa rós fyri at leypa á eitt land, sum ikki hevði lopið á USA ella eitthvørt annað NATO-land fyrst, fyri at steðga fólkamorði, so skal Bush yngri eisini fáa rós, tí hann leyp eisini á eitt land, sum ikki hevði lopið á USA ella eitthvørt annað NATO-land fyrst, fyri at steðga fólkamorði – og tað var enntá uttan at hava týdningarmikil lond sum Frakland og Týskland við sína lið. Sjálvandi kann onkur siga, at Bush vildi hava oljuna í Irak, men hann fekk so Saddam Hussein burtur frá valdinum, og tað vildi eg ikki mett vera eitt stig tann skeiva vegin hvat viðvíkur tí at fremja fólkaræði í Irak. Tað er so nakað heilt annað, at eg meti, at Bush fyri langari tíð síðan skuldi havt fingið skil á støðuna í Irak, og at hann av fyrstan tíð gott kundi latið vera við at nýta lygnir fyri at leypa á Irak. Eg haldi tó enn tann dag í dag, at tað var feikt av Týsklandi og Fraklandi, serliga, ikki at stuðla USA í krígnum móti Irak.

So higartil kunnu vit altso staðfesta, at uttanríkispolitikkurin hjá demokratunum millum ár og dag hevur víst seg at vera minst líka lítið verdur sum tann hjá republikanarunum. Demokratarnir eru teir republikansku demokratarnir. Hugtakið sýnist at vera ógvuliga meiningleyst, men í veruleikanum sýnist tað ógvuliga meiningleyst at gera skilnað millum demokratarnar og republikanararnar á tí uttanríkispolitiska økinum. Orsøkirnar, til at politikkurin hjá flokkunum á tí uttanríkispolitiska økinum er so líkur, kunnu vera so nógvar. Eitt er, at flokkarnir skulu tekkjast veljarunum, meðan eitt annað er, at flokkarnir verða ávirkaðir av m.a. lobby-felagsskapum í Washington.

## Amerikanskur innanríkispolitikkur

Nú er tað soleiðis, at meðan eg havi verið her, havi eg funnið útav, at tað finnast amerikumenn, ið ikki so frægt sum vita, hvat Hamas og Mahmoud Ahmadinejad eru fyri nakað, og við tí royni eg at siga, at amerikumenn flestir ikki hava áhuga fyri uttanríkispolitikki. Teir eru meira upptiknir av teirra egnu vælferð og av innanríkispolitikkinum hjá amerikonsku stjórnini.

So um vit nú venda nøsini móti tí, sum amerikumenn hava áhuga fyri, nevniliga innanríkispolitikki, so vil eg framvegis grundgeva fyri, at tað kann gera tað sama, um tú stuðlar demokratunum, ella um tú stuðlar republikanarunum. Fólk vilja siga, at Bush og republikanararnir bara framdu politikk til frama fyri tey ríku, men tað vóru í høvuðsheitum demokratarnir, sum til atkvøðugreiðsluna í Umboðsmannatinginum vóru teir heitastu talsmenninir fyri at atkvøða Bailout-bjargingarætlanina ígjøgnum, og bailoutætlanin kemur jú sum kunnigt teimum ríku bankamonnunum til frama. Tað skal sigast, at republikanararnir eisini atkvøddu bjargingarætlanina ígjøgnum, so í hesum føri kann onkur siga, at báðir partar atkvøddu til frama fyri tey ríku.

Amerikumenn vilja so siga, at teir atkvøða fyri Obama, tí at Bush hevur oyðilagt búskapin. Tað kann væl vera nakað um tað, men her skal man ikki gloyma tað ávirkan, sum kongressin hevur á búskapin, og í kongressini hava demokratarnir havt minst líka stóra ávirkan sum republikanararnir hesi seinnu árini, og serliga hesi síðstu tvey árini, har demokratarnir hava havt meirilutan í báðum tingunum. Amerikumenn vilja so aftur vera við, at teir stuðla tí demokratiska forsetavalevninum, tí at síðst ein demokratur var forseti, Bill Clinton, upplivdi búskapurin í USA eina framgongd sum aldrin fyrr í nýggjari tíð. Her skal viðmerkjast, at republikanararnir so sanniliga gjørdu sína ávirkan galdandi í kongressini um hetta mundið og kunnu, um teir eru sjálvglaðir, taka sín part av æruni fyri, at búskapurin hevði tað so gott í USA í nítiárunum.

## Tá Barack Hussein fór til te-munn hjá Ahmadinejad

Sum fólk nokk hava fingið við, vildi eg hvørki atkvøtt fyri McCain ella Obama. Eg vil ikki avdúka, hvønn eg hevði valt, síðan eg ikki meti tað vera relevant beint nú, men um eg endiliga hevði skulað valt millum Obama ella McCain, so hevði eg valt Obama, tí eftir átta ár við einum republikanskum forseta haldi eg tað vera sunt við einum nýggjum stýri. Eg meti, at eitthvørt fólkaræðisligt samfelag hevur brúk fyri at skifta út tíðunt, hetta so at allir partar sleppa framat. Ein onnur orsøk til at eg stuðli Obama er hon, at Obama vil tosa við okkara góða vin, Mahmoud Ahmadinejad, forsetan í Iran, og tað er nakað, sum McCain ikki vil. Eg dugi ikki at síggja, hvat skuldi verið skeivt í at tosa við iranska forsetan. Í mínum eygum er hann ikki ein størri terroristur, enn hvat Guantanamo-Bush er, og tá Larry King kann tosa við Mahmoud, so burdi John McCain eisini kunnað tosað við Mr. Mahmoud Ahmadinejad. Møguliga hevði tað kunnað bøtt um viðurskiftini í Miðeystri, um Mahmoud hevði bjóðað Obama til ein temunn. Ein triðja orsøk til at eg stuðli Obama er hon, at McCain er ov gamal, og hansara varaforsetavalevni, Sarah Palin, sýnist mær at vera ov óbúgvin til at taka við forsetaembætinum, skuldi McCain brádliga andast.

## Niðurstøða

So nú restar lítið í, áðrenn tað verður avgjørt, hvør verður nýggjur amerikanskur forseti. Vit vita enn ikki, um tað verður John McCain ella Barack Hussein Obama, ið verður nýggjur forseti, men eitt vita vit tó, og tað er, at Bush fer frá. Man kann siga, at høvuðsbragdið hjá Bush í hansara tíð var at fella Saddam Hussein. Men júst sum vit hildu, at vit vóru sloppin av við ein Hussein í Irak, so er væntandi, at ein annar Hussein tekur við valdinum í USA.

Tann triðja og síðsta greinin hjá mær fer at snúgva seg um Proposition 8 valið. Tað valið snýr seg um, hvørt tað longur skal vera loyvt hjá samkyndum í Kalifornia at gifta seg. Tað valið stendur eisini á skránni tann 4.november, tann stóra valdagin í landinum, har fólkaræði valdar, men har tann amerikanski dreymurin, rætturin hjá tí einstaka at velja sína egnu eydnu, er ógvuliga avmarkaður, av tí at tann einstaki bert hevur fyri siðvenju antin at velja millum demokratarnar og republikanararnar ella at sita við hús og ikki fara á val.

